gult cyan magenta svart




# Vit hava fingið nýtt telefonnummar




SANSIR TEL 355 355



Okkara nýggja telefonnummar er 34 10 10,
og telefax nummarið er nú 34 10 01

Skrivstovan er opin soleiðis:

**Á flogvøllinum:**
Mánadag - fríggjadag 08.00 - 17.00
Leygardag - sunnudag 09.00 - 12.00
- - 16.00 - 17.00

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01

www.atlantic.fo


gult cyan magenta svart



# Kongaminnið málað reytt



LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Tá havnafólk vóru á fótum aftur sunnumorgunin, varnaðust tey, at onkur loysingarsinnaður føroyingur hevur verið og gjørt um seg á Kongaminninum. Leygarnáttina hevur onkur verið framvið á staðnum, har Kongaminnið stendur, og prýtt hetta minnið um danska kongin Christian IX við reyðari máling. »LOYSING« stendur við stórum, reyðum stavum um Kongaminnið.

Løgreglan fekk fráboðan um herverkið sunnumorgunin, tá fólk varnaðust, at Kongaminnið ikki sá út sum vanligt. Viðkomandi hevur kanska hildið, at Kongaminninum tørvar eina fríðkan, so tað hóskar til tær nýggju tíðirnar. Kongaminnið varð reist í 1874 til minnis um Christian Rex IX.

Tann, sum hevur málað Kongaminnið, hevur málað tað á øllum fýra síðunum, men tað nógva regnið ta náttina hevur skolað ein part av tí burtur. Herverksmaðurin hevur málað orðið LOYSING á tvær síður, og á hinum síðunum hevur hann eisini verið við penslinum. Viðkomandi mátti vita, at mann ikki málar, tá hann sigur frá regni. Kanska hann vísir á hetta verkið, tá hann søkir arbeiði sum málari.

# 160 tónleikarar framførdu Ferðina

**Leygarkvøldið varð tónleikaverkið Ferðin eftir sandoyingin Sunleif Rasmussen framført í Norðurlandahúsinum. Ikki færri enn 160 fólk vórðu við í framførsluni**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*



*160 fólk framførdu tónleikaverkið Ferðin eftir Sunleif Rasmussen í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Fleiri enn 300 fólk lýddu á spennandi verkið hjá sandoyinginum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Samskipari av tiltakinum var Urd Johannesen, og hon var ógvuliga væl nøgd við framførsluna sum heild.

– Eg haldi, at framførslan eydnaðist ómetaliga væl, bæði hvat tí tónlistarliga og tí praktiska viðvíkur, sigur Urd.

Hon vísir á, at tónleikararnir vandu fyrstu ferð saman hóskvøldið, og tilsamans varð vant tríggjar ferðir áðrenn konsertina. Framførslan var tó ikki merkt stórvegis av, at tónleikararnir ikki høvdu vant serliga nógv saman.

Verkið Ferðin er spennandi og fjølbroytt. Tað rúmar nógv ymisk hugløg, og áhoyrararnir vóru sum heild tiknir við á Ferð við Sunleivi Rasmussen. Teksturin er tikin úr einum brævi, ið Jørgen-Frantz Jacobsen sendi Williami Heinesen, tá Jørgen-Frantz var 21 ára gamal.

Nógv fólk varð komið aðrastaðni frá til konsertina. Úr Danmark vóru 21 tónleikarar komnir, og teir spældu saman við Føroya Symfoniorkestri. Dirigenturin var íslendari og nakrir íslendskir tónleikarar vóru eisini við í framførsluni.

Kórið var samansett av Havnakórinum og einum íslendskum kóri. Tilsamans vóru eini 160 fólk á pallinum. Áðrenn Ferðin varð framførd, spældi Symfoniorkestrið 9. symfoni hjá Dvorak.

Sunleif Rasmussen er longu farin av landinum aftur. Hann er farin til Paris, har eitt av hansara verkum skal framførast.

# Tey yngru sýndu fram



*Teir yngru fimleikararnir sýndu fram kynstur síni fyri stúgvandi fullari høll, og tey løgdu doyðin á at hava ein framførslu uttan mistøk*

Leygardagin skipaði Havnar Fimleikafelag fyri fimleikaframsýning á høllini á Hálsi. Tað var ein innanhýsis kapping, har tey ymsu liðini sluppu at sýna fram tað, tey høvdu vant allan farna vetur. Tað var tí ikki ein kapping, men heldur bara ein framsýning.

Høllin á Hálsi var stúgvandi full av fólki, og tí var neyðugt at seta fleiri stólar upp, tí heilt fitt av fólki hevði leitað sær niðan í høllina leygardagin at síggja teir yngru fimleikararnar vísa síni kynstur.

Liðini sýndu fram seriur, sum tað kallast, og eisini íðkaðu tey reiðskapsfimleik við bukkum og ringum og øðrum reiðskapi.

## Harðligur dansur

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan varð boðsend tvær ferðir leygarkvøldið, í sambandi við at skipað varð fyri harmonikudansi í høllini í Trongisvági, hóast dansurin meira varð ætlaður teimum meira tilkomnu.

Fyrst fóru tveir persónar til hendurs uttanfyri høllina. Báðir høvdu kenning, og løgreglan fekk tamarhald á teimum báðum.

Seinni út ímóti morgni var aftur boð eftir varðmonnum lógarinnar. Tá var støðan heldur ófriðarlig inni í høllini. Fleiri vóru meira ella minni farnir til hendurs, so at løgreglan mátti leggja uppí.

Vakthavandi sigur, at teir persónarnir, sum vóru upphavið til ófriðin, vóru koyrdir til hús og ikki á støðina.

## Løgreglan elt skutararar í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Klaksvík hevur framt eitt átak ímóti teimum mongu ólógligu skutarunum og knallertunum, sum eru í býnum. Hetta er ein dilla, sum er um allar Føroyar, og skutararnir eru nógvir í tali allastaðni. Fleiri teirra eru ólógligir.

Tað eydnaðist at taka fleiri ólógligar skutarar og knallertir, sum koyra ov skjótt. Eigararnir av skutarum gera okkurt við útstoytið, sum hevur við sær, at akfarið kann koyra nógv skjótari enn loyvt er.

Løgreglan í Klaksvík sigur, at hetta er ein trupulleiki í býnum, at nógvir skutarar kunnu koyra ov skjótt. Tí framdu tey hetta átakið, sum eftir øllum at døma eydnaðist væl. Løgreglan vónar, at hetta fer at ræða eigarar frá at tuna akførini.

Løgreglan leggur hald á akførini, sum eru ólóglig, og tekur teir lutirnar, sum ikki lúka neyðugu treytirnar, út. Akfarið verðu síðani latið eigaranum aftur, men uttan teir lutirnar, sum eru ólógligir.

Løgreglan fekk eisini fráboðan um trý smávegis ferðsluóhapp leygardagin, har eingin stórvegis skaði stóðst. Paragraf 13 kanningar vóru eisini gjørdar, og nakrir vórðu skrivaðir upp fyri brek.

## Tvey ferðsluóhapp

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

**Løgreglan í Havn sigur annars frá einum sera friðarligum vikuskifti. Tvey ferðsluóhapp hava verið, har eingin stórvegis mansskaði var at siga frá.**

Leygarmorgunin koppaði ein bilur í Kollafirði. Óhappið hendi inni í bygdini, og bilurin endaði á takinum. Trý fólk vóru í bilinum, og tey kláraðu øll at sleppa sær út.

Eitt annað óhapp hendi á Oyggjarvegnum. Har fór ein bilur av vegnum norðanfyri Norðradalsskarð. Vegurin var hálur, og førarin misti tamarhaldið á bilinum. Bilurin fór illa, men teir báðir persónarnir sluppu við smávegis snuddum.